Frakland, Senegal, Uruguay og Danmark:

Hvør verður tvey'arin

Stóri spenningurin tykist snúgva seg um, hvør sleppur at fylgja heimsmeistarunum úr Fraklandi til 1/8-parts finalurnar

BÓLKUR A
Jákup Mørk

Frakland hevur sýnt seg sum sterkasta landið seinastu fýra árini. Eingin ivi um tað. Sum verjandi heims- og europameistarar hava teir vunnið seg ovast á styrkislistanum hjá FIFA, og hóast teir beint fyri HM sera óvæntað máttu lúta fyri Belgia á heimavølli, so er neyvan nakar ivi um, at meistararnir fara at vinna seg víðari í kappingini.

Tað er tó eitt bakkast fyri Frakland, at teir í øllum førum mugu vera Zidane fyri uttan til fyrsta dystin, og møguliga í øllum teimum trimum fyrstu dystunum. Hinvegin kann eisini hugsast, at hetta verður ein fyrimunur. HM er ein long og strævin kapping, har stórar byrðar verða lagdar á leikararnar. Vinnur Frakland seg víðari, og Zidane tá er púrasta frískur, kann tað væl gerast ein fyrimunur, at hava ein feskan leikara í heimsflokki, tá stjørnur hjá kappingarneytunum kanska fara at móðast. Og so skal heldur ikki gloymast, at sjálvt uttan Zidane hevur Frakland eitt lið í heimsflokki.

Vandamiklir outsidarar

Kappingin um at gerast tvey'ari í bólkinum, tykist hinvegin sera hørð. Bæði Uruguay og Danmark hava áður sýnt, at tey væl eru før fyri at standa seg í slíkum kappingum, men outsidararnir úr Senegal eiga sanniliga eisini at takast í álvara.

Hóast liðið ikki telur tær heilt stóru stjørnurnar, so er talan um leikarar, sum ofta hava roynt seg á altjóða pallinum. Eitt nú við fronskum liðum, har størsti parturin av leikarunum dagliga hava sítt yrki.

Minnini úr Mexico

Grannar okkara úr Danmark hava undir leiðslu av Morten Olsen ment seg heilt nógv. At teir vunnu sín undankappingarbólk framman fyri eitt Kekkia má eisini metast sum eitt lítið bragd, og sigur hetta ikki so lítið um styrkina, sum danska liðið hevur í løtuni. Hóast fráverur av ymsum slag hava verið undir fyrireikingunum, so verður mett, at allir leikarar hjá dønum verða tøkir til HM, og so eigur ikki at gloymast, at tær báðar ferðirnar, sum Danmark hevur tikið lut í HM, hevur liðið spælt seg víðari úr bólkaspælinum.

Fyrru ferðina, danir tóku lut í HM var í 1986, tá kappingin fór fram í Mexico. Neyvan er nakar danskur ella føroyskur hyggjari, sum hevur gloymt hetta, og í Uruguay er tað so í øllum førum ikki gloymt. Tað varð nevniliga mett sum landaskomm, tá danir við millum øðrum júst verndi venjaraparinum á odda vundu burtur úr tvífaldu heimsmeistarunum. 6-1 gjørdist úrslitið ta ferðina, og umframt stríðið um at koma víðari í kappingini, fer júst dysturin móti dønum at vera tann kanska týdningarmesti hjá verandi landsliðnum úr Uruguay.

Tað kann tó hava avgerandi týdning fyri Uruguay, hvussu væl stjørnurnar á liðnum eru fyri. Hin størsta av hesum er uttan iva Alvaro Recoba, men hann dregist við skaða í knænum, og sigst vera sera ivasamur til fyrsta dystin í kappingini.

Dystirnir:

31.05	Frakland-Senegal
01.06	Uruguay-Danmark
06.06	Danmark-Senegal
06.06	Frakland-Uruguay
11.06	Danmark-Frakland
11.06	Senegal-Uruguay

Spania, Slovenia, Paraguay og Suður Afrika:

Slovenia hevur møguleikan

Spania er favorittur, men teir hava áður kiksað, so møguliga verður tað lítla Slovenia, sum enn einaferð tekur øll á bóli

BÓLKUR B
Jákup Mørk

Undanfarna HM-undankapping gjørdist fyrstu ferðina, at Føroyar tóku stig frá einum landi, sum seinni leikti seg til endaspælið í kappingini.

Bragdið hjá Øssi Hansen og hinum landsliðsleikarunum kann eisini gerast enn størri, um so er, at Slovenia eisini megnar at spæla seg víðari úr bólkaspælinum, og sannlikindini fyri hesum eru kanska ikki heilt eingi.

Stóri favoritturin í bólkinum er Spania, men tað merkir tó ikki, at teir uttan víðari kunnu spáka sær víðari í kappingini. Fyri fýra árum síðani var støðan júst lík henni í dag, men tá endaðu spaniólarnir aftan fyri bæði Nigeria og Paraguay.

Yvir høvur hevur tað eisini verið galdandi fyri Spania, at liðið ikki hevur staðið seg væl í endaspælinum, hóast liðið mangan hevur talt hópin av altjóða stjørnuleikarum.

Hesa ferð er einki undantak í so máta. Leikarar sum Hierro, Raul og Morientes teljast millum stjørnurnar í Real Madrid, og fyri flestu av vídleikarum teirra er eisini galdandi, at teir teljast millum álitini í nøkrum av mætastu europeisku fótbóltsfeløgunum.

Venjarin, Camacho, hevur eisini havt hepni til at smíða eina sterka eind burtur úr øllum stjørnunum, og so er spurningurin, um Spania hesa ferð megnar at vinna seg longur enn »bara« til fjórðingsfinalurnar, sum tað so ofta er blivið til. Tilfarið er til staðar. Spurningurin er bara, um endaliga avrikið eisini er nóg gott.

Frísporkini tekur málverjin

Sum nevnt, so var júst Paraguay eitt av mótstøðuliðunum hjá Spania seinast, og at liðið ta ferðina skuldi vinna seg víðari, varð mett sum stórhending í landinum. Sjálvandi var tað keðiligt, tá Frakland í seinastu minuttunum av longdu leiktíðini sendi Paraguay úr teirri kappingini, men fram til gylta málið hjá Blanc hevði liðið hildið fast um liðið, sum seinni varð kosið heimsins besta.

Tað er eisini fyrst og fremst í verjupartinum, at Paraguay hevur sína styrki. Væl stýrd av einum at bestu málverjunum í heiminum, Chilavert, í málinum, er verjan bulurin á liðnum, og so verður bara bíða eftir kontramøguleikunum. Aloftast hava hesir kós móti Roque santa Cruz, ella verður dyrgt eftir frísparki, sum málverjin so kann koma fram at skjóta.

Verða neyvan undirmettir

Hvørki Slovenia og Suður Afrika kunnu sostatt roknast millum favorittarnar í bólkinum, men tey eiga tó á ongan hátt at avskrivast.

Slovenia hevur tvær undankappingar á rað mótsagt øllum serfrøðingum, tá teir hava leikt seg til endaspælið, og hesa ferð verður tað neyvan nakar, sum uttan víðari undirmetir Zahovic & co., tá teir traðka inn á grasið. Fótbólturin er hin so typiski fyri balkanlondini, har bólturin verður førdur spakuliga kring vøllin, fyri síðani at eksplodera í ógvusligum temposkiftum, og júst hetta slagið av fótbólti kann vísa seg at gerast sera heppið, tá spælast skal í nógva hitanum.

Hitini verður heldur ikki nakar trupulleiki hjá Suður Afrika, men tað kann tó vísa seg at gerast meira enn torført hjá liðnum at vinna seg úr bólkaspælinum. Við allari virðing fyri FCK og Toda, so ræðir tað neyvan mótstøðuliðini, at ein hin besti leikarin á liðnum hevur sína dagligu gongd í danska høvuðsstaðnum. Aðrir kendir leikarar eru Quinton Fortuna og Benny McCarthy, men yvirhøvur tykist Suður Afrika at vera veikasta liðið í bólki B.

Dystirnir:

02.06	Paraguay-Suður Afrika
02.06	Spania-Slovenia
07.06	Spania-Paraguay
08.06	Suður Afrika-Slovenia
12.06	Slovenia-Paraguay
12.06	Suður Afrika-Spania

Brasilia, Turkaland, Kina og Costa Rica:

Lætt samba-spæl

Brasilia hevur sterkastu siðvenjuna av øllum í HM-høpi, og bólkaspælið líkist ikki nakrari forðing hjá samba-landinum

BÓLKUR C
Jákup Mørk

Teir hava verið við hvørja ferð. Fýra ferðir hava teir verið heimsmeistarar. Legg hartil tvey silvur- og tvey bronsumerki. Jú. Einki er at ivast í, at Brasilia er eitt stórveldi innan fótbóltin, og tí verða teir aloftast mettir millum favorittarnar, tá mett verður um kappingina.

Hesa ferð er støðan tó eitt sindur øðrvísi. Í sambalandinum halda tey ivaleyst enn, at landið er hitt besta í heiminum, men úrslitini seinnu árini siga nakað annað. Tað var nevniliga um reppið, at Brasilia als kiki kom við til HM. Í undankappingini gekk tað av skriðjuni til í útidystunum, men sterki heimavøllurin slóðaði tó í seinasta enda fyri ferðini til Japan og Korea.

Við nøvnum sum Rivaldo, Carlos, Lucio, Ronaldinho og Denilson skal tó vera løgið, um Brasilia ikki vinnur seg víðari úr bólkaspælinum, har lagnan hevur verið teimum blíð, men tað verður tó neyvan hesaferð, at Brasilia vinnur sítt fimta HM-heiti. Heldur ikki hóast teir nú aftur kunnu gera nýtslu av bóltsnillinginum, Ronaldo, sum eftir drúgvan skaðateð nú tykist vera komin fyri seg.

Royndirnar koma

Tá sagt verður, at lagnan hevur verið Brasilia blíð, so er hetta grundað á móttstøðuna, sum teir fáa í bólkaspælinum. Costa Rica og Kina verða á ongan roknaðir sum stórar fótbóltstjóðir, og hóast Turkaland hevur ment seg nógv seinnu árini, so er enn nakað eftir, áðrenn teir røkka upp móti hægstu tindunum.

Turkarar fara tó uttan iva at leggja seg eftir at arga brasilumenn, tá dystirnir verða leiktir. Síðani liðið fyri góðum tíggju árum síðani spældi javnt móti Føroyum í Gundadali eru stór framstig hend. Millum annað hevur Galatasary sum fyrsta turkiska felagið vunnið europeiska kapping, og í dag eru fleiri av leikarunum at finna í størum europeiskum feløgum.

Hóast teir soleiðis hava vunnið seg til nbæði EM og HM, so tykist tað enn so, at teir ikki hava tað, sum krevst fyri at gera seg galdandi í endaspælinum, men royndirnar gerast alsamt fleiri, og í møguleikin at koma til næsta umfarið hevur neyvan verið betri, enn hann er hesaferð.

Sensatión krevst

Fyri bæði Costa Rica og Kina er galdandi, at tað er mest sum ein sensatión, um hesi megna at vinna seg víðari í kappingini.

Gaman í megnaði Costa Rica hetta fyri tólv árum síðani, tá kappast varð í Italia, men at rokna við hesum enn einaferð, er helst ov nógv kravt. Møguleikin er tó altíð til staðar, og er tað í stóran mun Paolo Wanchope, sum umboðar hendan. Megnar málslúkurin á liðnum at spæla upp til sitt, samstundis sum vanliga sterki verjuparturin kann gera sítt, so kann sensatiónin ikki útilokast.

Tað kann hon heldur ikki, tá tað ræður um Kina. Landið við fleiri enn einari milliard íbúgvum hevur ongan tíð áður tikið lut í HM, men hesaferð hava teir so vunnið seg fram. Frægastu leikararnir á liðnum eru í europeiskum høpi rættiliga ókend nøvn, men onkur kennist kanska við Sun Jihai frá Manchester City, ella Yang Chen úr Eintracht Frankfurt.

Megnar liðið at vinna seg víðari, er hetta at meta sum ein risa-sigur, men alt í alt líkist hetta einum fjórða plássið í bólkinum.

Dystirnir:

03.06	Brasilia-Turkaland
04.06	Kina-Costa Rica
08.06	Brasilia-Kina
09.06	Costa Rica-Turkaland
13.06	Costa Rica-Brasilia
13.06	Turkaland-Kina

hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 31. mai til hósdagin 6. juni

Brandur vitjar Bubber

Bubber er vertur í einari sending sum er hvønn sunnudag í tveir tímar á TV2. Sendingin er fyri børn og blaðung og ofta er pláss fyri ungum stjørnuskotum og hesaferð er Brandur Enni við

Borð um borð umborð

Dagfinn Olsen ummælir:

Farna mánaðin og farnu vikuna hevur framhaldssøgan av Gamla Apotekinum verið fastur táttur í loftmiðlunum.

Framhaldssøgu hava miðlarnir so hegnisliga dopt hesa politisku oyðimarkargongd. Tað kemst næstan ikki undan at hugsa um, at vónandi verður hetta ikki sum hjá hevundanum J. P Heinesen, sum fór á ferð inn í eina óendiliga søgu. Henda er annars júst týdd til týskt, so her er tilfar til mentanardeildirnar hjá loftmiðlunum.

Verkir

Í skrivandi stund tykist tað tó, sum er ein samgonga við at siggja dagsins ljós. Tungur burður, má sigast.

Veit ikki, um tingmenn hava verkir. Tað hava í hvussu er tey, sum liva undir avleiðingunum av tiknu avgerðunum teirra. T.d. tey, ið nýta farleiðirnar millum oyggjarnar. Har slepst ikki undan sjóverki.

Hóast eitt landsstýri, sum røkkur fullum aldri, fýra ferðir í livskeiðnum fær sama trupulleika, so endar á sama hátt hvørt ár. Har læra fólk ikki av mistøkum. Eingi hóskandi avloysaraskip eru at seta inn, tá gamli strandfaraflotin skal sminkast og bøtast.

Her er tilfar til miðlarnar at grava í. Og tað hava teir eisini gjørt. Men saknar er í eini sending, sum veruliga tekur og endavendur samfelagstrupulleikum, sum eru frammi í dagsljósi at kalla alla tíðina.

Vit kunnu her sammeta við DR-Dokumentar ella líknandi sendingar, sum veruliga ganga fólkunum við ábyrgdini upp á nervarnar.

Nú skal tað sigast, at eg vil ikki kalla føroyskt fjølmiðlaarbeiði fyri mikrofonhaldari, sum tað í ov stóran mun var fyri nøkrum árum síðani.

Nei, her eru framstig hend. Men rættuligar endavendingar siggja vit sjáldan. Her kundu vit havt gott av at fingið okkurt munabetri.

Áðrenn vit fara heilt burtur frá evninum víðvíkjandi politikki og ferjum, so var eg í ti løgnu støðu at siggja Borð um borð umborð.

Nevniliga umborð á nýggjasta farinum í ferðamannaflotanum. Dangan nevnist Scania. Vit sigldu í logn. Tó bóltaði nógv til síðis í løtum, so leysu stólarnir høvdu hug at skifta pláss.

Skilligt er, at her er ein ferja leigað til føroysku havaldúna, sum er von at sigla á deyðavatni. (Í Føroyum hevur Scania eisini bert loyvi at sigla við umleið helvtini av tí, sum hon siglir við har hon kemur frá).

Tá hatta vóru rembingarnar í logn, so kanska vit fara at hoyra onkra avlýsing, tí veðurgudarnir ikki skikka sær heilt væl næstu vikurnar.

Men tað var sendingin umborð, nevniliga Borð um borð, sum eg skuldi nevna.

Á Botni og umborð

Ein fín mótvekt til Botnin er henda sendingin í hvussu er.

Tað tykist greitt, at málbólkurin hjá Leivi Hansen og Marius Rein er tey ungu, sum eru farin um tey hálvthundrað.

Og tað mundi eisini treingja til. Ti neyvan er Botnurin fyri øll. Á Botninum er helst ov grunt og tey, so tey eldru og tey meira »at sær komnu« falla frá. Ov langt er ímillum, at tær meira djúpu glósurnar falla. Hóast orðið »djúpt« verður nevnt nakrar ferðir, so er heldur grunt og tunt.

Men tað er jú júst ætlanin, so tað er í ordan!! Hetta er lætt, um enn tað ikki er djúpt. Har eru tó løtur, sum eru áhugaverdar hjá teim flestu, t.d. húsarannsóknin.

Hini, t.d. tey eldru, hava nú Borð um borð at hyggja at. Tey kunnu fara av Botni og upp til vatnskorpuna og umborð.

Annað gleðiligt, sum sjónvarpshyggjarar hava at gleðast um er, at í summar verður kanska ikki tíðindaloysi í SvF. Herfyri varð lýst eftir avloysarum til summarfrítíðina, so her verður kanska ikki slitt í tíðindafloyminum.

Og summarið er vanliga eisini á góðari leið í ÚF, so vit hava eitt gott summar í væntu.

Hetta, um vit ikki leggja okkum alt ov langt í annað borðið og fara at spæla okkum við orðini; borð um borð, umborð, djúpt og botnurin… Nei, kanska vit fáa eina samgonguskútu, sum vil nakað meira á samferðsluøkinum. Um ikki, so eiga miðlakanónirnar at rættast mótvegis teim skeivleikum, sum hvørt ár skapa yvirskriftir. Á so mongum økjum.

Og skotið eigur nú at verða við skørpum. Tí hetta er í roynd og veru ein týðandi uppgáva hjá fjølmiðlunum, sum jú sum kunnugt eru fjórða statsmaktin. Og hetta tykjast føroyskir miðlar nú eisini at hava tikið at sær.

Alt er ikki bert undirhald, hóast tað síðstu vikurnar mangan hevur sæð soleiðis út. Men undirhald skal til, og tað kann so mangan eisini hjálpa til at seta álvarsama veruleikan í sterkari ljós.

Vónandi fáa vit eitt summar, har ljósið verður varpað lættliga á gaman og álvara. Tí tað eru ikki dugnalig fjølmiðlafólk, sum okkum vantar. Tey hava vit. Kanska eru tað heldur fólk á hægri rókum, sum duga at taka í egnan barm, ið okkum vantar, tá ljósvarparin verður settur á røkur, har tað tykist hava verið heldur illgongt og trupult at fóta sær.

HM-skráin í fótbólti

Fríggjadagur 31. mai
12.00 HM í fótbólti: Frakland-Senegal
20.25 HM-fótbóltur

Leygardagur 1. juni
9.50 HM í fótbólti: Uruguai-Danmark
12.20 HM í fótbólti: Týskland-Saudiarabia
20.50 HM-fótbóltur
23.25 HM2002 - dysturin í dag

Sunnudagur 2. juni
8.20 HM í fótbólti: Paraguai-Suðurafrika
10.20 HM í fótbólti: Ongland-Svøriki
12.20 HM í fótbólti: Spania-Slovenia
20.40 HM-fótbóltur
23.00 HM2002 - dysturin í dag

Mánadagur 3. juni
7.20 HM í fótbólti: Kroatia-Meksiko
9.50 HM í fótbólti: Brasil-Turkaland
12.00 HM í fótbólti: Argentina-Nigeria
20.25 HM-fótbóltur
23.05 HM2002 - dysturin í dag

Týsdagur 4. juni
9.50 HM í fótbólti: Japan-Belgia
12.20 HM í fótbólti: Korea-Pólland
14.20 HM í fótbólti: Italia-Ekvador
20.25 HM-fótbóltur
23.35 HM2002 - dysturin í dag

Mikudagur 5. juni
07.20 HM í fótbólti: Russland-Tunesia
9.50 HM í fótbólti: USA-Portugal
12.00 HM í fótbólti: Kina-Kosta Rika
20.25 HM-fótbóltur
23.30 HM2002 - dysturin í dag

Hósdagur 6. juni
7.20 HM í fótbólti: Danmark-Senegal
9.50 HM í fótbólti: Kamerun-Saudiarabia
12.00 HM í fótbólti: Týskland-Írland
20.25 HM-fótbóltur
23.40 HM2002 - dysturin í dag

Føroyar í dag

Roxanne – næsen er i vejen